# Øll líkini funnin

Kavarar hava nú funnið tey seinastu líkini av teimum, sum doyðu, tá ein tyrla datt niður eystan fyri skotsku strondina seinasta mikudag. 16 fólk vóru í tyrluni, og øll doyðu. Átta teirra vórðu funnin stutt eftir vanlukkuna, og í gjár vórðu líkini av hinum átta funnin, sigur bretska løgreglan. Tey seinastu líkini vórðu funnin, eftir at vrakið av tyrluni var funnið á umleið 60 favna dýpi einar 10 fjórðingar úr býnum Peterhead. Tyrlan, var á veg úr Aberdeen út á Miller-oljuleiðina, tá vanlukkan hendi.



# Tilflytarar skerdan atkvøðurætt

Í grønlandi heldur løntakarafelagsskapurin SIK, at fólk, sum flyta til Grønlands, skulu búgva har í fimm ár, áðrenn tey kunnu fáa atkvøðurætt til landstings- og kommunuval. Tað kom fram á landsfundi hjá felagsskapinum um vikuskiftið, og fundurin samtykti eisini at royna at fáa landsstýrið at taka undir við hugsjónini, sigur KNR. Eftir núverandi reglum fáa fólk, sum flyta til Grønlands, atkvøðurætt, tá tey hava búð har í eitt hálvt ár. Formaðurin í SIK, Jens G. Berthelsen, sigur við kringvarpið, at tað er neyðugt at endurskoða lógina, nú tað kann væntast, at nógv fólk fara at koma til Grønlands í arbeiðsørindum í komandi árum.





*Kaj Leo Johannesen, løgmaður, og Lars Løkke Rasmussen, forsetisráðharri, í Mykinesi.*

*Mynd: Privat mynd*

drekkur vatn.

- Hetta ger hann longu frammanundan, men pressan hevur givið eina mynd aðra mynd av honum, sum vit mugu arbeiða fyri at broyta, sigur Sólrun.

Hóast hon hevur verið ministarafrúa seinastu árini, roknar hon við, at leikluturin hjá forsætisfrúa verður nakað øðrvísi. Eitt nú verða fleiri uttanlandsferðir og meiri umboðan. Hetta fer sjálvandi eisini at ávirka hennara borgarliga starv sum lærari í lesiskúlanum á Balletskúlanum á Kongaliga Teatrinum í Keypmannahavn.

- Men hetta tosaðu vit longu um, tá eg varð sett í starv. At eg komi at hava nakað av fráveru, tí eg eri kona Lars. Men sjálvandi royni eg at vera so lítið burtur sum til ber, sigur Sólrun, sum kemur frá einari av teimum mest tjóðskaparsinnaðu familjunum í Føroyum, sum abbadóttir Sigurð Joensen, sála.

## Elskar Føroyar

Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen og Lars Løkke Rasmussen eiga trý børn, sum øll skilja føroyskt. 19 ára gamla Berg, sum er á skótaleiðaraskeiði í Tunesien í páksaferiu, og 13 ára gomlu Lisu, sum gongur í 7. flokki, umframt Símun, 12 ár, sum gongur í 6. flokki. Børnini hava altíð gingið í lokala kommunuskúlanum.

- Vit ferðast vanliga heim einaferð um árið. Mamma mín, Bergljót av Skarði, er ófør at halda teimum til føroyska málið, eitt nú við at senda teimum bøkur og annað tilfar á føroyskum, sigur Sólrun, sum tí viðgongur, at tað verður tosað nógv danskt heima.

- Her eru so ofta onnur fólk eisini, at tað tykist ófólkaligt at tosa føroyskt, sum hini ikki skilja, sigur hon, og vísir til ungu au-pair gentuna úr Russlandi, og pápa Lars, Jeppe, sum hjálpir væl til við at halda havan hjá familjuni við líka.

Tá Sólrun og Lars komu saman, var hann ikki so glaður fyri at ferðast við henni heim til Føroyar. Men síðan er hetta batnað. Ikki minst eftir at tey fingu børn saman.

- Nú dámar honum líka væl at koma til Føroyar sum eg. Har fær hann frið, sleppur at súkla nakrar góðar túrar og at vera úti í náttúruni, sigur Sólrun, sum eisini fegnast um, at maðurin seinastu árini hevur bygt upp ein vinaskarða í Føroyum, serliga við monnum úr Sambandsflokkinum.

- Nú er tað soleiðis, at tá vit eru heima, fer hann sínar egnu túrar við vinmonnunum, til dømis til fótbóltsdyst í Gundadali, sigur Sólrun, sum nú biður meg bíða við, tí tað pikkar á dyrnar. Afturkomin greiðir hon frá, at tað var grannin, sum kom við blómum og at ynskja tillukku við Lars.

- Hetta er eitt gott grannalag. Ein lítil vegur við fimm húsum, og so eitur tað Solbakken, sigur hon, og vit flenna, tí tað var júst á vælumtókta kollegiinum Solbakken í Enghave, har nógvir føroyingar hava búð, at Sólrun vaks upp fyrstu sjey árini, áðrenn hon flutti til Føroyar at ganga í 2. flokki.

- Hóast vit hava rættiliga langa leið inn til arbeiðis um morgunin, so ætla vit avgjørt at verða búgvandi her, sigur Sólrun, sum lovar, at familjan kemur til Føroyar at ferðast longu í summar.

- Árligi summarfundurin hjá Venstre verður hildin í Føroyum miðskeiðis í august. So tá koma vit heim áðrenn, sigur Sólrun, sigur Sólrun, sum hevur fleiri støð at vitja í Føroyum. Barndómsheimið hjá pápanum í Dáli og húsini hjá mammuni og systkjum hennara við Gjógv. Og so heima hjá pápanum í Klaksvík.

- Og vit gleða okkum longu at koma heim.



*Lars Løkke Rasmussen og føroysk vinfólk undir Vestmannabjørgunum*

*Mynd: Privat mynd*